# Krabbameinsútgreining
# Útgreining fyri eitlakrabba og kroniska lymfatiska leukæmi (CLL)

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um eitlakrabba og kroniska lymfatiska leukæmi (CLL)

Niðanfyristandandi sjúkueyðkenni og funn vekja illgruna um eitlakrabba og kroniska lymfatiska leukæmi (CLL)

- Ein ella fleiri støddarøktir eitlar (> 1,5 - 2 cm í størsta ummáli) uttan aðra upplagda orsøk
- Troyttleiki uttan upplagda orsøk
- Viðvarandi fepur uttan kenda orsøk
- Náttarsveitti
- Ótilætlað vekttap (5% av vanligu vektini yvir 6 mánaðir, ella 10% upp á < 1 ár)
- Anæmi uttan aðra upplagda orsøk
- Viðvarandi hækkað lymfocyttal ≥ 5 x 10^9/L longri enn 3 mánaðir (lymfocytosu)
- Støddarøkt milt (splenomegali)

Oftast byrjar illgrunin til eitlakrabba við einum ella fleiri støddarøktum eitlum

Sjúklingar við ávístari lymfocytosu, uttan tilhoyrandi sjúkueyðkenni ella funn, hava ikki akuttan viðgerðartørv.
Illgruni um CLL eigur at konfererast við hæmatologiska amb., men ikki ávísast til krabbaútgreining.

## Um omanfyristandandi er til staðar, eiga niðanfyristandandi blóðroyndir at bíleggjast

Hb, differential teljing, trombocyttar, kreatinin (eGFR), Na, K, calcium (total), ALAT, LDH, basisk fosfatasa, bilirubin, INR, CRP og urat

## Støddarøktir eitlar í høvur/háls økinum

Funn av einum ella fleiri eitlum uttan fyri ØNH-økið kann geva høvi til ávísing til ymiskar útgreiningar, ann upp á hvar eitilin er funnin, anamnesa og kliniskan illgruna. Sjúklingar við ógreiðum almennum sjúkueyðkennum kunnu ávísast til diagnostisk pakkan.

| Staðseting av eitli | Útgreiningareind |
|---|---|
| Høvur-háls | Útgreinan hjá ØNH *ella* útgreinan fyri eitlakrabba |
| Axilla, kvinnur | Bróstkrabbi |
| Axilla, menn | Diagnostiskt |
| Øll onnur støð | Diagnostiskt *ella* útgreinan fyri eitlakrabba |

Um ivamál er um biokemisku kanningarúrslit kann konfererast við hæmatologisku deild á Ríkissjúkrahúsinum.

GG! Hæmatologi verður røkt av donskum serlæknum, tí er frægast, at aktuelt í ávísingini í Cosmic
verður skrivað á donskum.

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "hæmatologi - illgruni um eitlakrabba og CLL" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026